Álit

í

løgtingsmáli nr. 85/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Talgildu Føroyar (Heimild at hækka útreiðslur)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 16. februar 2021 og eftir 1. viðgerð 23. februar 2021, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 8. og 11. mars 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen, saman við Skráseting Føroya, og við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, saman við Talgildu Føroyum.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Í § 1, stk. 3 í galdandi løgtingslóg nr. 77 frá 29. mai 2017 um Talgildu Føroyar er ásett, at útreiðslurnar hjá landsstýrismanninum í mesta lagi kunnu verða 85 mió. kr. Hetta hámark er nátt við árslok 2020 og neyðugt er tí at hækka ásettu upphæddina við 8 mió. kr., frá 85 mió. kr. til 93 mió. kr. til at menna nýggja virkisskrá, gera nýggja heildarætlan fyri Talgildu Føroyar og menna fleiri tænastur á Vanganum, sbrt. § 1, nr. 2 í hesum uppskoti.

Við einari almennari virkisskrá fær føroyska samfelagið:

- eina fullfíggjaða og álítandi virkisskrá, sum kann gagnnýtast av øllum
- dagførda, álítandi og ókeypis atgongd til grundardátur um løgfrøðiligar eindir, framleiðslueindir og undirframleiðslueindir
- økt gjøgnumskygni og betri hagtalsgrundarlag
- fyrimunir av at dupultskráseting fellur burtur
- útflýggjan og móttøka av grundardátum millum ymiskar partar verður lættari

Undir viðgerðini er nevndin kunnað um, at stórur tørvur er á nýggju virkisskránni. Føroyar eru limur í altjóða skattasamstarvinum Global Forum, sum snýr seg um gjøgnumskygni og umbýting av skattaupplýsingum millum limalond. Global Forum krevur m.a., at limalondini menna eina virkisskrá, sum skal lúka serligar treytir. TAKS og Skráseting Føroya eru við til at menna virkisskránna í mun til tær treytir, sum Global Forum setir. Nevndin er av tí áskoðan, at tað er avgjørt neyðugt at fáa virkisskránna gjørda sum skjótast.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 18. mars 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	